# Kvinnurnar rýma undan r



**Allastaðni í útnorðri venda ungu kvinnurnar smáplássunum bakið og leita sær inn til stórbýin. Granskarar eru samdir um, at útjaðarin má laga seg meira til kvinnuligu virðini, skal honum vera lív lagað**




FÓLKAFRØÐI

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í øllum útnorði flýggja ungu kvinnurnar í hópatali til stórplássini, har útbúgvingar, persónligar avbjóðingar, hóskandi vælferðartænastur og mentanartilboð lokka. Hesi tilboð vinna skjótt á maskulinu og siðbundnu útjaðaramentanini, har lítið verður hildið um bókliga útbúgving og stórbýarkendu cafélátte mentanina.

Í stórum pørtum av Noraøkinum, Norðurnoregi, Íslandi, Føroym og Grønlandi er lutfallið millum kvinnur og menn 90/100. Tess tættari vit koma stórbýunum, tess javnari er býtið millum kvinnur og menn.

Tey flestu taka helst undir við, at ungdómurin fer út í heim at nema sær útbúgvingar og royndir. Men vit ynskja tey samstundis heim aftur, tá tey skulu seta búgv, so tey kunnu vera við til at byggja land.

Tí tað er ein sannroynd, at ógvuslig urbanisering (fólkaflyting til stórplássini) hevur við sær eina skeikláða fólkasamanseting – bæði í mun til kyn og aldur.

Á Nora-ráðstevnuni um fólkafrøðiligar avbjóðingar í útnorðuri, Challenged by Demography, sum var í Alta í Norðurnoregi herfyri, var kynsspurningurin millum teir heilt stóru: Hvussu fáa vit kvinnurnar at støðast betri í útnorðri?

### Gamlamannaklubbin

Hóast nakrar kvinnur sluppu at stjórna nøkrum workshops, var tað sigandi, at, av teimum 14 fyrilestrahaldarunum á ráðstevnuni var einans ein kvinna. So tað var kanska ikki so løgið, at serfrøðingarnir innan demografi róptu seg sjálvar ”De gamle mænds klub”. Og hugleitt varð um, at

## Ungdómar á bygd í Grønlandi vórðu spurdir, um teirra ætlanir fyri framtíðina

**Dreingir:**
11% ætla at verða verandi á bygd í heimkommununi
38% ætla at flyta til ein bý í heimkommuni
22% ætla at flyta í ein annan bý
19% ætla at flyta til Nuuk
12% ætla at leita sær eftir avbjóðingum uttanlands

**Gentur:**
<1% ætla at verða verandi á bygd í heimkommununi
16% ætla at flyta til ein bý í heimkommuni
18% ætla at flyta í ein annan bý
37% ætla at flyta til Nuuk
29% ætla at leita sær eftir avbjóðingum uttanlands

*Rasmus Ole Rasmussen, NORDREGIO, “Why Demography Matters”*

## Hvørji flyta burtur?

- Tey, sum hava pengar, flyta oftari burtur
- Tey við útbúgving flyta oftari burtur
- Húsarhald við tveimum forsyrgjarum flyta ikki so ofta burtur
- Kvinnur flyta oftari enn menn
- Tað er spurningurin um hvat er tað góða lívið, sum avgerð, um um folk fara ella ikki.

*Rasmus Ole Rasmussen, NORDREGIO, “Why Demography Matters”*

## Hesir faktorar skulu vera til staðar, skal eitt útjaðarasamfelag yvirliva:

- Javnstøða
- Spennandi størv
- Nærleiki
- Pláss og náttúra
- Eitt bøssapar og ein grafiskur designari …

*Lindis Sloan, Demographics in Coastal Communities - It's all about Gender*